WH100 – WH100 – WH100 – WH100 – WH100

# Heima á foldum

Í vikuni hava 2 fólk frá Kgl. Bókasavninum fingist við at seta upp stórfingna framsýning í Norðurlandahúsinum, nú 100 ára dagur William Heinesens verður hildin. Landsbókasavnið er eisini við og Gunnar Hoydal hevur verið føroyska umboðið, ið hevur fyrireikað sýningina Heima á foldum

*Dagfinn Olsen*

**Myndir: Jens Kristian Vang**
**Tekningar: Z. Heinesen og W. Heinesen**

Í dag, 15. januar 2000, verður 10 ára dagur William Heinesens hildin. William andaðist í 1991.

Gunnar Hoydal hevur vegna Føroya landsbókasavn fyrireikað eina framsýning í Norðurlandahúsinum, har dentur verður lagdur á lív og verk Williams. Gunnar hevur samstarvað við 2 fólk frá Kgl. Bókasavninum í Danmark. Framsýningin er fyrst í Føroyum og skal síðani til Danmarkar á nýggja Kgl. Bókasavnið, Diamanten.

Heima á foldum er yrking hjá Williami Heinesen og Gunnar Hoydal sigur, at dentur verður lagdur á at lýsa skaldskapin, tí tað metti William Heinesen sjálvur eisini var høvdusgreinin í listavirkseminum.

Sýningin er skipað soleiðis, at byrjað verður í gamla býarpartinum í Havn, ið er upphav høvundans.

Síðani verður farið víðari til ætt og uppvøkstur. Í 1916 fer William til Danmarkar á keypmansskúla og kom hann har í samband við danska høvundan Otto Gelsted. William gevur ungur út yrkingar. Fram til 1936 gevur hann út 5 yrkingasøvn,

Menn William Heinesen verður ikki lagdur til merkis aðrastaðni, enn í Danmark. Hetta hendir ikki fyrr enn skaldsøgurnar koma. Blæsende Gry kom í 1934. Á føroyskum fekk hon heitið Degningsvindar.William verður týddur til fleiri mál.

Men gjøgnumbrotið hjá honum er De fortabte spillemænd, Glataðu Spælimenninir. Bókin kom í 1950. Seinni roynir hann seg sum stuttsøguhøvund.

Framsýningin vísir eisini ummæli uttan úr heimi, brøv og handrit.

Gunnar Hoydal sigur, at t.d. er brævið til Svenska Akademiið at síggja, har William avvísir, at hann skal taka ímóti Nobelheiðurslønini.

Framsýningin hevur eisini útvarps- og sjónvarpsupptøkur at bjóða, so tey vitjandi sleppa at hoyra mannin sjálvan koma við metingum.

**Eisini myndlist**
Eisini myndlist eftir William Heinesen er at síggja.

Myndlist Williams fevndir bæði um tekningar, klipp og málningar. Zacharias Heinesen hevur hjálpt til við at seta myndirnar upp.

Gunnar Hoydal metir, at hjá Williami var hetta við myndlistini beint øvugt av, hvat tað er hjá so ongum øðrum. Listin gjørdist fríari og fríari og 75 ára gamal fór hann undir at klippa og gjørdist sannur meistari.

Eisini áhugin fyri listamanninum vaks og er kanska størri nú, enn nakrantíð. Hetta sæst t.d. eisini á, at seinni í ár verður ein ráðstevna á Fróðskaparsetrinum um skaldskap William Heinesens og Jørgen-Frantz Jacobsens.

Gunnar sigur í hesum sambandi, at møguliga verða brøv Williams til vinmannin Jørgen-Frantz givin út. Hetta er ómetaligt mentanarsøguligt dokument, ið kann metast sum høvuðsverk Williams. Sostatt er høvuðsverk hansara enn ikki komið á prent.



**Gunnar Hoydal hevur fyrireikað framsýningina Heima á Foldum. Zasharias Heinesen hevur tikið sær av myndlistatilfarinum. M.a. eru tekningar William Heinesens, sum flest øll kenna úr lesibókum nú komnar undan kavi aftur á Gamla Bókhandli, har lesibøkurnar á sinni verðu prentaðar**

**Partur av samfelagskjakinum**
William Heinesen hevur verið lagdur undir at geva ranga mynd av føroyingum, men Gunnar minnir á, at hetta er ein skaldslig mynd.

Framsýningin tekur eisini upp, at William var partur av samfelagskjakinum, t.d. við blaðgreinum. Tá danir hava lyndi at nevna hann »hyggeonkel«, so er hetta ikki allur sannleikin.

William var t.d. ímóti Nato í Føroyum. Nú Svarta Bók er komin vísir tað seg, at William var á góðari leið á mongum økjum.

William Heinesen stendur eftir sum skaldið, ið ikki allir føroyingar lósu. Tá Den Sorte Gryde, Í sortanum, kom, vaktist nakað av áhuga, men mangir føroyingar meta, at hann fór ov illa við føroyingum.

Men á ellisárum vann hann viðurkenning her heima. Gunnar Hoydal minnir á í innganginum til prentaðu skránna fyri 100 ára hátíðarhaldið, at á 90 ára degi hansara varð skipað fyri kyndlagongu niðan undir Varða.

Framsýningin Heima á foldum letur upp leygardagin klokkan 16 og har verður yrkingin Heima á foldum lisin, kvøða borin fram og tónleikur eftir William at hoyra. Landsstýrismaðurin í mentamálum, Signar á Brúnni, heldur røðu.



**Smáttan, har William skrivaði, stendur omanfyri húsini Undir Varða**



**Í 1962 gjørdi Zacharis Heinesen hesa tekning av skrivandi pápanum í smáttuni**



WH100 – WH100 – WH100 – WH100 – WH100

# Annika Hoydal sett løg til tekstir hjá Williami

Annika kemur til Føroya at hava konsert í samband við útgávuna, Konsertin verður tann 30. januar í Norðurlandahúsinum.




*Dagfinn Olsen*

Í samband við 100 ára dag William Heinesens, gevur Annika Hoydal út fløgu. Hon hevur sett løg til tekstir hjá Williami.

Fløgan nevnist Stjerner mine venner. Annika sigur í tíðindaskrivi, at William var á miðjum havi, men á einum serstøkum stað, Torshavn.

William er sum søgusigari kendur um stóran part av heiminum, men hann hevur eisini givið út 7 yrkingasøvn. Annika hevur latið nakrar av yrkingunum í tónleikabúna, í samband við 100 ára dagin.

Yrkingarnar eru úr ymsum tíðarskeiðum í lívi Williams og geva eina heildarmynd av hansara treytaleysu verju av tí menniskjasliga, tí góða, hugflognum og einum sunnum látri.

John von Daler hevur lagt tónleikin tilrættis. Eitt samstarv um landamørk, ið tekur støði í Tórshavn, eitt serstakt stað undir høgu stjørnunum.

Vert er at leggja sær í geyma, at Annika kendi William í uppvøkstrinum. Hon er dóttir annan av Føroya stóru skøldum, Karstin Hoydal, ið var vinmaður Williams. Gunnar Hoydal skrivar um hetta í fløguhúsanum..

Annika minnir á, at William ikki var rættiliga viðurkendur tá, men pápi hennara og William prátaðu ofta um ymisk viðurskifti. Ein annar av vinmonnunum hjá Williami var Heðin Brú. Teir vóru grannar og høvdi eisini kúgv saman.

Annika kemur til Føroya at hava konsert í samband við útgávuna, Konsertin verður tann 30. januar í Norðurlandahúsinum.

# Móðir Sjeystjørna á pall

Frumsýning er klokkan 20 í dag á Gamla Meiaríi.



**Klokkan 20 frumsýnir Gríma Móðir Sjeystjørnu**

*Dagfinn Olsen*

Klokkan 20 í dag, 15. januar, fer Gríma á pall við leikinum Móðir Sjeystjørna. Egi Dam hevur skrivað leikin eftir bók William Heinesens av sama navni. Egi Dam leikstjórnar eisini.

Hann byrjaði aðrastaðni í skaldskapi Williams, men endaði við at gera eina av sínum yndisbókum til leik, hóast hann hevði mett uppgávuna ov torføra. Tá hann fór at leita sær bakgrundstilfar, endaði hann við at gera Móðir Sjeystjørnu til leik.

Talan er um ljóðmynd og Stamen Stantchev ger tónleikin, ið er nýskrivaður og tónar eftir William Heinesen.

Leikarar eru Súsanna Tórgarð, Katarina Nolsøe, Birita Mohr, Ria Tórgarð, Páll Danielsen og Hans Tórgarð.

Laura Joensen er framleiðslustjóri og forvitnisligt er, at abbadóttir William Heinesen, Elisa Heinesen, hevur gjørt pallmyndina. Hon er scenaografur.

Frumsýning er klokkan 20 í dag á Gamla Meiaríi.

# Nógv verður gjørt burturúr degnum

*Dagfinn Olsen*

Nógv tiltøk eru á skránni, nú 100 ára dagurin hjá fjøltáttaða listarmanninum William Heinesen er 15. januar ár 2000.

Familjan hjá Williami heldur, at sera nógv er gjørt burturúr. Kona William, Lisa, livir enn. Hon er í dag 93 ára gomul.

- Ellin merkir hana, men hon er tó púra klár, sigur sonurin, listarmaðurin Zacharias Heinesen.

Hann sigur, at sjálvsagt fegnast tey í familjuni um alt, ið gjørt verður fyri at heiðra William. Lisa Heinesen fær tó ikki tikið lut. Men hon er sera fegin um alt, ið fer fram. Hon er sera upptikin av øllum, ið snýr seg um William.

Zacharias Heinesen heldur, at nakað av tí, ið t.d. verður víst fram, hevur verið at sæð áður. T.d. tá William fylti 85 og 90 ár. Men okkurt er heldur forkunnugt at síggja, við tað, at eisini Kgl. Bókasavnið er við til at fyrireika framsýningina Heima á Foldum í Norðurlandahúsinum.

- Onkutíð hevur ein kanska hug at halda, at tað verður gjørt heldur nógv burturúr, men sjálvsagt eru vit fegin um áhugan, sigur Zacharias Heinesen.




**Elisa Heinesen er 93 ára gomul, so ei undur í, at ellin merkist, men hon fegnast um tiltøkini, ið heiðra manninum á 100 ára degi hansara. Zacharias Heinesen hevur teknað mammu sína**